UTTAN ÚR HEIMI

## Ringt ár hjá fjølmiðlafólki

Á hvørjum ári lata fleiri tíðindafólk og onnur fjølmiðlafólk lív í arbeiðinum, men tað hevur ongantíð verið so ringt sum í fjør.

Sambært altjóða stovninum fyri tíðindatrygd, INSI, doyðu 146 fjølmiðlafólk, meðan tey vóru til arbeiðis. Tann størsta einstaka vanlukkan var í iranska høvuðsstaðnum Teheran fyri stuttum, tá eitt flogfar við millum annað 48 tíðindafólkum og myndafólkum rendi á eini háhús. Øll doyðu. 37 av hinum 98 doyðu í Irak, og tað merkir, at nú hava 100 fjølmiðlafólk latið lív, síðan kríggið har byrjaði í mars í 2003. Tey flestu fjølmiðlafólkini, sum doyðu í Irak í fjør, vóru irakar.

Tey flestu tíðindafólkini, sum lótu lív í fjør, doyðu í álopum av ymsum slagi. Minst 68 vórðu skotin, sjey doyðu av bumbuspreingingum, trý vórðu myrd, og tvey hvurvu í Irak. Alt bendir á, at tey vórðu hálshøgd, sigur INSI.

Minst 70 doyðu, meðan tey vóru til arbeiðis. Hini doyðu í skotbardøgum ímillum stríðandi partar ella av tilvildarligum álopum.

## Virðisløntar bøkur vrakaðar

Ein kanning í Bretlandi hevur avdúkað, at tað er sera ymiskt, hvussu forløg meta bókmentir, og hvønn kunnleika tey hava til kendar bøkur.

Millum annað vísti tað seg, at einki forlag kendi handritið til skaldsøguna "In a Free State", sum V. S. Naupal fekk ta viðurkendu Booker-virðislønina fyri í 1971, og einki forlag segði seg vera sinnað at geva handritið út í bók. Eitt sindur frægari gekst handritinum til skaldsøguna "Holiday", sum Stanley Middleton fekk Booker-virðislønina fyri í 1974. Eitt forlag helt handritið vera vert at geva út.

Blaðið The Sunday Times sendi 20 bretskum forløgum handritini, men broytti navnið á høvundunum. Niðurstøðan hjá blaðnum er, at forløgini leggja seg eftir tilfari hjá kendum fólki, og at tað er sera torført hjá einum nýggjum høvundi at sleppa ígjøgnum nálareygað. Harafturat vísir tað seg, at tað skal vera lætt at selja bókina og høvundin, ella sum The Sunday Times tekur til:

- Ert tú 29, ljóshærd, vøkur og kend, so er tað nóg mikið til at fáa sáttmála við eitt forlag um útgávu.

## Sharon fekk mutur



Ísraelskasjónvarpsstøðin Channel 10 vil vera við, at ísraelska løgreglan hevur prógv fyri, at familjan hjá Ariel Sharon, forsætisráðharra fekk næstan 20 milliónir krónur í mutri frá einum eysturríkskum vinnulívsmanni. Í einari sending í gjár vísti Channel 10 avrit av skjølum, sum sambært støðini vísa, at húskið hjá Sharon fekk pengarnar frá Martin Schlaff og bróðuri hansara James í 1999.

Løgreglan hevur fyrr ákært synir Sharons fyri at hava tikið ímóti ólógligum pengum, og í gjár kunngjørdi annar teirra, at hann fer úr tjóðartinginum. Omri Sharon hevur viðgingið, at hann hevur falsað skjøl, og at hann hevur tikið ímóti ólógligum stuðuli til seinasta valstríðið.

Sharon sjálvur er ikki skuldsettur enn, men Channel 10 heldur uppá, at løgreglan hevur skjøl, sum vísa, at hann er eisini sekur. Ráðgevi hansara, Lior Chorev, sýtti í gjár fyri at gera viðmerkingar til sendingina í sjónvarpinum, skrivar AP.

## Røkke keypir



Aker Yards hjá norska ríkmanninum Kjell Inge Røkke hevur í dag keypt eina stóra skipasmiðju í Saint-Nazaire í Fraklandi. Skipasmiðjan, sum er ein av teimum størstu í Evropa, hevur tey seinastu tjúgu árini lagt seg eftir at byggja stór ferðamannaskip, og millum skipini, sum eru smíðað har, kunnu nevnast "Sovereign of the Seas" og "Queen Mary 2".

Tað kom ikki óvart á nakran, at Aker Yards keypti fronsku skipasmiðjuna, tí fyri einum mánað síðani segði kunningarstjórin, Tore Langballe, at Aker ætlar at keypa tvær ella tríggjar útlendskar skipasmiðjur í ár.

# Bara ein var á lívi

**Fyrst fingu tey avvarðandi at vita, at tólv av teimum trettan monnunum vóru bjargaðir á lívi. Seinni komu boð um, at bara ein var á lívi**

VANLUKKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Øll eru skelkað. Eg vildi ikki trúgva tí. Teir hava logið fyri okkum alla tíðina.

Avvarðandi hjá teimum 13 kolanámsarbeiðsmonnunum, sum vórðu stongdir inni í einum námi í West Virginia mánadagin, vóru á gosi, tá tað í morgun frættist, at 12 av monnunum vóru funnir deyðir.

Tríggjar tímar frammanundan høvdu tey fingið at vita, at ein maður var deyður, og at hinir 12 vóru funnir á lívi. Fólk hálsfevndust, og kirkjuklokkurnar ringdu, men løtu seinni vendist gleðin til sorg. Bara tey avvarðandi hjá í 26 ára gamla Randal McCloy kundu fegnast. Hann hevði fingið stóran skaða, men var á lívi.



*Her síggjast inngongdirnar til kolanámið í Tallmansville*

*Mynd: Reuters*

Teir 13 menninir, sum júst vóru farnir til arbeiðis aftan á jólafrítíðina, vóru tríggjar kilometrar inni í náminum og 80 metrar undir jørð, tá ein spreinging gjørdi, at teir sluppu ikki útiaftur. Bjargingarlið fóru alt fyri eitt undir at royna at bjarga monnunum, men arbeiðið var trupult, tí nógv gass var í náminum. Í nátt bleiv kunngjørt, at bjargingarliðini høvdu funnið ein mann deyðan, men at hinir 12 vóru á lívi.

Tað vísti seg at vera beint øvugt.

Tað er fyritøkan International Coal Group, sum eigur námið, ið er í Tallmansville einar 160 kilometrar í landnyrðing úr Charleston.


STARVSLÝSING

## Starvsfólk til havnadeildina

**Søkt verður hervið eftir fólki til havnadeildina at taka sær av eftirliti, viðlíkahaldi og innsavning av dátum í sambandi við vind-, aldu- og streymmátingar. Havnadeildin hevur ábyrgdina av málum viðvíkjandi havnum og lendingum, fysiskari planlegging á sjónum, geofysiskum, hydrografiskum og meteorologiskum mátingum og øðrum.**

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum skal røkja, fevna eitt nú um:
- Uppseting og viðlíkahald av veðurstøðum
- Útlegging og viðlíkahald av streym- og aldumátarum
- Góðskutryggja tær dátur, sum verða innsamlaðar
- Fyrireika veðurdátur til heimasíðuna.
- Skráseta dátur í dátagrunni Landsverks umframt aðrar fyrifallandi uppgávur

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir fólki við útbúgving innan kt-økið, og sum hevur tekniskan førleika og áhuga fyri at menna verandi skipanir. Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, skal duga at skipa sítt arbeiðsøki og geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum, umframt vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt. Neyðugt er eisini, at umsøkjarin hevur vanligt koyrikort.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, møguligum ummælum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til:

Landsverk,
Postsmoga 78,
FO 110 Tórshavn,

og skulu verða skrivstovuni her í hendi í seinasta lagi 16. januar 2006. Merkið brævbjálvan "Starvsfólk til havnadeildina". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ewald Kjølbro, deildarleiðara, á tel. 311 333 lokal 316 ella fartel. 540 861.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land